## Fráboðanir um avgjøld ávirka innflutningin

**Tubbak:** Hesi seinastu tvey árini hevur innflutningurin av sigarettum verið serliga stórur tann seinasta ársfjórðingin.

Nakað minni varð innflutt av sigarettum í 2004 enn árið undan. Í 2003 vóru innflutt 70 tons av sigarettum og í 2004 minkaði talið niður í sløk 65 tons. Sum nevnt, var bæði árini ein serliga stórur innflutningur tann seinasta ársfjórðingin.

Innflutningurin av sigarettum í síðsta ársfjórðingi hevur árini frammanundan 2003 legið um 15 tons. Men bæði í 2003 og 2004 fór innflutningurin upp á 25 tons seinasta ársfjórðingin, vísa tøl frá Hagstovuni.

Meðan innflutningurin árini frammanundan hevur verið javnari alt árið, hevur hesi seinastu tvey árini verið stórur munur á ársfjórðingunum. Tað sýnist, sum handlarnir skunda sær at innflyta sigarettirnar, tí teir vænta at politiska tosið um avgjøld fer at dýrka vøruna.

Í 2003 var sami stóri vøksturur í sigarettinnflutningi seinasta ársfjórðingin, tí avgjaldshækkingar vóru í væntu. Men tá kom løgtingsval í vegin fyri lógaruppskotinum og tí kom eingin avgjaldshækking.

Hesa ferð raktu handlarnir kortini beint, tí nú er avgjaldshækkingin komin í gildi, men nú hava handlarnir innflutt stóran part av ársnýtsluni seinasta ársfjórðingin við lægra avgjaldinum.

**sb.**




# Spaki settur í nýggja sparikassan



*Teir eru byrjaðir at grava út fyri nýggja Sparikassanum í Fuglafirði, og verður hann liðugur við ársskiftið*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Fuglafjørður:** Mold og flag verða í hesum døgum grivin oman av grundstykkinum í Fuglafirði, har nýggja deildin hjá Sparikassanum skal byggjast.

Útgrevsturin byrjaði týsdagin í farnu viku, og hesa vikuna var ætlanin, at spreingiarbeiðið skuldi byrja, skrivar heimasíðan hjá Sparikassanum.

Jan Mohr, byggimeistari úr Fuglafirði, hevur høvuðsarbeiðstøkuna um hendi, og tí stendur hann eisini fyri at byggja bygningin.

Tíðarætlanin, sum í løtuni liggur á borðinum, vísir, at flytast kann inn í nýggju sparikassadeildina í Fuglafirði við ársenda.

Tá tann nýggi bygningurin verður liðugur fara bæði kundar og starvsfólk í Fuglafirði at fáa munandi betri umstøður í einari nýmótans deild.

Arkitektafelagið "Arkitektar 99" við Johan Laksafoss hevur teknað bygningin.

**sb.**




